**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sosialráðgevi til økispsykiatriina

Á økispsykiatrisku deildini er eitt fulltíðar farloyvisstarv sum sosialráðgevi leyst at søkja til setan 1. januar 2006 til og við 31. desember 2006 .
Viðkomandi, ið sett/ur verður, kemur at arbeiða bæði á sjálvum deplinum og úti í økjunum í tøttum samstarvi við verandi sosialráðgeva og onnur starvsfólk á deplinum og í økjunum.

**Vit kunnu bjóða**
- eitt spennanadi tvørfakligt arbeiðsumhvørvi við nógvum avbjóðingum.
- skeið/eftirútbúgving innan- og uttanhýsis, sum psyk.depilin/økispsykiatriska deildin skipa fyri.

**Arbeiðsuppgávur í høvuðsheitum**
- kunna ráðgeva og vegleiða sjúklingum og avvarðandi teirra um sosiala lógarkarmin, t.d. sjúkradagpening og endurútbúgving
- vera bindilið sjúklingsins til aðrar stovnar, t.d. Almannastovuna
- at tryggja sosialfakliga partin í tvørfakliga samstarvinum

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum sosialráðgevi við minst 2 ára starvsroyndum
- góð samstarvsevni, ídni, hug og dirvi til at luttaka í einum sera fjøltáttaðum arbeiði saman við øðrum fakbólkum
- førleika og royndir til at fremja sjálvstøðugt virksemi
- fyrimunur at viðkomandi hevur psykiatriskar royndir og áhuga innan tað psykiatriska øki
- verða við í menningini av tí psykiatriska arbeiðinum bæði á deplinum og úti í økjunum.
- teldukunnleika

**Lønar- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Ænu Reinert, deildarleiðara á økispspsykiatrisku deildini, telefon 304500, lokal 4130, e-post ana.reinert@lsh.fo Magnus Isaksen, sosialráðgeva, lokal 4160, e-post mais@lsh.fo ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, e-post bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 14. november 2005 kl. 12.00
*Tað er umsøkjarans ábyrgd, at umsóknin er á Lønar- og starvsfólkadeildini áðrenn freistin er úti.*

**Skrivlig umsókn,** merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

---

**Mentamálaráðið**
Mentamáladeildin

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
Tel. 35 50 50
Faks 35 50 55
mmr@mmr.fo
www.mmr.fo

## Skrivari til verkætlan um føroyskan málpolitikk

Eitt áhugavert og sjálvstøðugt tíðaravmarkað starv (1. januar – 31. desember 2006) sum skrivari er leyst at søkja í samband við verkætlan um føroyskan málpolitikk og lóggávu í hesum sambandi.

**Starvið**
Høvuðsuppgávan er at vera skrivari hjá málkommissiónini, sett samb. løgtingssamtykt. Skrivarin hevur harumframt til uppgávu at leggja til rættis og samskipa arbeiðið við støði í arbeiðssetninginum.

**Málkommissiónin hevur henda arbeiðssetning:**
- Við støði í heildarlýsing av støðuni hjá føroyska málinum skal málkommissiónin gera eitt upplegg til almennan málpolitikk. Í upplegginum skulu vera boð uppá mál og mið í málpolitikkinum, og uppskot til ítøkilig tiltøk við fíggjarligum kostnaðarmetingum, sum kunnu vera partur í heildarætlan at styrkja føroyskt mál í øllum samfelagnum.
- Tættir í hesum eru eitt nú:
  - yvirskipaða endamálið í málpolitikkinum, rættindi borgarans og skylda landsins
  - málpolitisk amboð, herundir málrøkt og málvernd, og spurningurin um at seta í verk løggilding av rættskrivingarreglum
  - føroyskt í øllum útbúgvingarkervinum, herundir førleikamenning og ískoytisútbúgvingar í føroyskum
  - gransking í føroyskum og føroyskt sum vísinda- og fakmál
  - føroyskt í miðlunum, bókmentunum og listini
  - føroyskt í telesamskiftistøknini (fartelefonin, samskiftistelduforritt)
  - føroysk skúlabóka- og orðabókagerð
  - føroysk máltøkni (talusyntesa, ljóðbøkur) og teknmálstulking/-tala
  - føroyskt og útlendsk mál (serstakliga í mun til danskt og enskt)
  - málpolitikkur í øðrum londum

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal:
- hava prógv í føroyskum frá lærdum háskúla
- kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstarva við málkommissiónina

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø, verður send til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
Ella til t-post: mmr@mmr.fo

Umsóknin skal verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 21. november 2005, kl. 16:00
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, ella Urd Johannesen, fulltrúa, á tlf. 35 50 50.

*Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti, og øðrum frítíðarvirksemi. Í aðalskrivstovuni eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin í Mentamálaráðnum er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild, og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.*

---

**AJOUR**
**BÓKHALD og ROKNSKAPUR**

- ger lívið lættari
- fá tíð til kundar og familju

so set teg í samband við Ajour, vit kunnu taka okkum av tygara:

- bókføran og avstemman
- mvg uppgerðum
- lønum og avrokningum
- roknskapi og grannskoðan
- rakstrar- og fíggjarætlanum

**AJOUR**
**530 Fuglafjørður · Tel 444 320 · Fartel 218320**

PS: Ein ikki AJOURførd roknskaparskipan gevur tær fráboðan um gongdina

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Moldplássið í Kollfjarðadali

Moldgoymslan í Kollfjarðadali verður í næstum stongd av við bummi.

Kollfirðingar, ið hava tørv á at avhenda mold og avgrevstrartilfar á økið, kunnu venda sær til Christian Martin Dam, arbeiðsformann í Kollafirði, á tlf. 254003.

www.torshavn.fo